# Vodafone Ísland keypir meirilutan av partabrøvunum í Kalli

TÍÐINDASKRIV

Vodafone Ísland, sum hevur havt ein ognarpart uppá 14% í Kalli, keypti hósdagin 7. juli meirilutan av partabrøvunum og felagið eigur nú 82,1% av felagnum.

Kall og Vodafone hava samstarvað í fleiri ár. Samstarvið hevur higartil mest verið av tøkniligum slag, men við keypinum verður helst talan um enn tættari samstarv – eisini á sølu og marknaðarsíðuni.

Fyri viðskiftafólkini hjá Kalli fær keypið jaligar fylgjur. Við at verða ein partur av ein størri samskiftissamtaki verða nýggjar tænastur skjótari á føroyska marknaðinum enn annars.

Keypið merkir eisini, at Vodafone trýr uppá føroyska marknaðin og á kappingina her á landi. Kall verður við keypinum eitt munandi sterkari felag í Føroyum.

Vodafone er skrásett á Íslendska partabrævamarknaðinum. Við keypinum verður gjøgnumskygni hjá Kalli størri og hetta setur nýggj krøv til fyrisitingina av felagnum.

Kursurin, sum Vodafone rindaði fyri partabrøvini í Kalli, var 1800. Hetta merkir, at gomlu eigararnir, herímillum Framtaksgrunnur Føroya og Notio hava fingið eitt gott avkast av íløgu sínum. Við hesum handli er marknaðarvirðið av Kalli ásett til 61 mió.kr.




*Bjarni Askham Bjarnason, stjóri*

Tað er Kauphting Føroyar, sum hevur staðið fyri søluni av partabrøvinum í Kalli til Vodafone Ísland.

Kall var sett á stovn av fleiri vágafúsum útlendskum og føroyskum íleggjarum, sum samanlagt settu uml. 36 mió. DKK í felagið. Við søluni kann staðfestast, at tilber at gera váðafúsar íløgur í Føroyum við góðum úrslitum. Nevnd og leiðsla frøðast yvir, við greiðum málsetningum og dugnaligum starvsfólkum, at hava verið við at skapa eitt gott avkast til íleggjarar felagsins.

## FAKTA

**Stutt um Kall (www.kall.fo)**

| | |
|---|---|
| Umsetningur 2004: | 51 mió.DKK |
| Starvsfólk: | 18 |
| Stjóri: | Bjarni Askham Bjarnason |
| Nevndarformaður: | Óli Hansen |

**Stutt um Vodafone Ísland (www.ogvodafone.is)**

| | |
|---|---|
| Umsetningur 2004: | 660 mió.DKK |
| Starvsfólk | 250 |
| Stjóri: | Eirikur S. Jóhannsson |
| Nevndarformaður: | Skarphéðinn Berg Steinarsson |
| Felagið fæst við: | Telesamskifti, Sjónvarp, Útvarp, Internet og blaðútgávur |
| Millum dóttirfeløg felagsins teljast: | "365" sum rekur m.a. sjónvarpsstøðina Støð 2, Frettablaðið, útvarpsrásina "Bylgjan" og internetportalin visir.is<br>Lina.net, sum veitir breiðbandstænastur |

# Amnesty fordømir bumbuálop

TÍÐINDASKRIV

Amnesty fordømir hvassliga bumbuálopini, sum vóru framd í London miðbýi fyrrapartin í dag. Fleiri fólk eru deyð og nógv fleiri særd. Álopini hendu, meðan fólk vóru á veg til arbeiðis, og tað ljóðar, at talið av deyðum og særdum veksur enn.

Tankar okkara og samkensla okkara er við øllum sum eru rakt av hesi meiningsleysu hending sigur aðalskrivarin í Amnesty, Irene Khan.

- Medvitað álop á sivil kunnu aldrin rættvísgerast. At brúka fólk, sum eru á veg til arbeiðis við undirgrundartokum og bussum, sum málskivur vísir eina fullkomna vanvirðing fyri mest grundleggjandi humaniterum prinsippum.

- Hesi álopini mugu steðgast og tey seku setast fyri rættin, metir Amnesty.

Vit eru altíð fús at svara spurningum ella greiða nærri frá onkrum máli. Ring ella skriva til skrivstovuna, ring heim til ein av nevndarlimunum ella legg eini boð á telefonsvararan, so seta vit okkum í samband við tykkum.

Føroyingar við Bush:

# Steðgað píning á Guantanamo

TÍÐINDASKRIV

Amnesty heitir á føroyingar um at biðja Bush forseta syrgja fyri at steðga píning og ringari viðferð á Guantanamo leguni

"Søgurnar, ið tey søgdu, vóru óhugnaliga líkar: Tey blivu bukað; hongd eftir handliðunum og sligin; klæðini vórðu tikin frá teimum og tey vórðu sett í ringan kulda; tey vórðu noydd av hava bind fyri eyguni. Øll váttaðu, at hetta varð gjørt av amerikanarum. Fleiri tosaðu um elektriskar stoytir. Nøkur vóru fyri hesum og fleiri sóu hetta verða gjørt".

Hetta eru brot úr tí, sum ein amerikanskur sakførari skrivaði eftir í januar 2005 at hava hitt kuveitar, sum vóru fangar í fangaleguni á Guantanamo.

Harðskapurin í Abu Ghraib varð fordømdur um allan heimin. Hesar valdsgerðir hava tó tíverri hvørki verið tey einastu ella seinastu dømini um at amerikanskir myndugleikar hava viðvirkað til píning og ringa viðferð av fólki. Fráboðanir koma framvegis um valdsgerðir í Afghanistan, Irak og í fangaleguni á Guantanamo.

Fangarnir eru blivnir avbyrgdir uttan tíðarfreist; rætturin til svøvn er tikin frá teimum; fangarnir hava verið fyri kynsligari eyðmýking; fangarnir eru blivnir hóttir og hava verið fyri eftirgjørdum avrættingum og aðrari mannminkandi og eyðmýkjandi viðferð. Harumframt hava verið dømi um, at fólk tilvildarliga eru hildin aftur og at fólk eru blivin burtur. Hetta verður alt gjørt í navninum hjá bardaganum móti yvirgangi.

Les meira á heimasíðuni www.amnesty.fo har tað eisini ber til at taka bræv niður og senda amerikanska forsetanum. Hann verður í dag endurgivin fyri at hava sagt á tíðindafundi í Keypmannahavn, at einki er galið við Guantanamo leguni.

Vit eru altíð fús at svara spurningum ella greiða nærri frá onkrum máli. Ring ella skriva til skrivstovuna, ring heim til ein av nevndarlimunum ella legg eini boð á telefonsvararan, so seta vit okkum í samband við tykkum.